# Reinsaríið skal eita REINSARÍIÐ

Mentamálanevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur gjørt av, at gamla reinsaríið skal eita Reinsaríið. Seinastu dagarnar hava vit hoyrt Reinsaríið í Havn verið nevnt “Hansens Pakkhús”. Men millum havnarfólk hevur húsið verið betur kent sum “Reinsaríið”. Hvør minnist ikki ímyndina av Reinsarínum, Mariu á Reinsarínum? Mentamálanevndin sigur, at navnið “Reinsaríið” altíð skal nýtast, tá ið kunnað og lýst verður við tiltøkum í húsinum.



# Ellisakfør fara at grilla

Viðrar leygardagin, fara limir í Føroya Ellisakførum at grilla uttan fyri felagshølini yvir við Strond í Havn. Tað er fastur siður hjá felagnum at skipa fyri einum grilltiltaki um longsta dag. Føroya Ellisafør varð stovnað í 1992. Felagið hevur einar háltannaðhundrað limir og hevur fleiri afturvendandi tiltøk. Tað mest eyðsýnda tiltakið hjá felagnum er, tá ellisakførini verða ”luftað” flaggdagin. Eitt annað tiltak er grillingin longsta dag. Tiltakið leygardagin verður kl 15 – men treytin er, at tað verður turt í veðrinum.

# Rúsan fríari ræsir at virka undir

**Landsstýrið umhugsar at gera Rúsuna til eitt alment partafelag so at hon verður eitt sindur leysari frá beinleiðis politiskari ávirkan**

RÚSAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið umhugsar nú at umskipa Rúsdrekkasølu Landsins til eitt alment partafelag.

Hildið verður, at tað kunnu vera fyrimunir við at umskipa Rúsuna til eitt alment partafelag og tað er ein møguleiki, sum landsstýrið nú fer at kanna.

Rúsdrekkasølurnar í hinum norðurlondum við einkarsølu, eru almenn partafeløg og tað ger, at tær í ávísan mun kunnu virka undir vanligum handilsligum treytum.

Verður Rúsan skipað sum eitt alment partafelag, fer tað at loysa hana eitt sindur burtur frá beinleiðis politiskari stýring við tað, at stjórin kemur at vísa til nevndina og ikki til landsstýrismannin.

Og harumframt gevur tað henni so eisini fríari ræsir at virka á handilsligum grundarlagi.

### Sleppa ikki ávirkan

Men Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, leggur dent á, at skuldi tað enda við at Rúsan verður eitt alment partafelag, kann endamálsorðingin í rúsdrekkalógini kann verða tann sama, sum er at innflyta og selja rúsdrekka.

- Men talan verður heldur ikki um at sleppa endamálinum um at tálma rúsdrekkanýtsluna.

- Vit skulu eisini hava í huga, at Rúsan er ein serlig fyritøka, har politikarir altíð vilja hava møguleikan fyri at seta nakrar treytir fyri virkseminum.

- Talan verður ikki um at einskilja Rúsuna, tí tað kemur ikki upp á tal. Og hóast hon verður skipað sum eitt alment partafelag, verður hon framvegis almenn og talan verður altíð um eina fyritøku, sum politiska valdið fer at hava ávirkan á, hóast hon verður loyst eitt sindur frá politiska valdinum, verður hon skipað sum eitt alment partafelag.



*Landsstýrið kannar nú møguleikan fyri at gera Rúsuna til eitt alment partafelag, men politikarar fara kortini ikki at sleppa allari ávirkan*

- Hetta er ein heilt serlig fyritøka og tí er tað umráðandi, at vit viðgera tað væl og virðiliga, áðrenn vit gera broytingar.

*Men nú upplivdu vit fyri nøkrum árum síðani, at Rúsan tók ávís sløg av alko pops av hyllunum eftir stóra politiska misnøgd við, at hon var farin at selja hesi sløgini. Fær Rúsan fríari ræsir at selja um hon verður eitt alment partafelag?*

- Tað er ilt at siga. Sjálv haldi eg, at tað er skeivt at selja alko pops, tí talan er í veruleikanum um sodavatn við rúsdrekka í, sum serliga er ætlað ungum fólki og sum av álvara eggjar ungfólki til at drekka. Men eg kann endurtaka, at skuldi Rúsan verið alment partafelag, fer politiska valdið langt frá at sleppa allari ávirkan á Rúsuna og tað er ongin sum sigur, at hon fær púra fríar ræsir at selja tað, hon vil, sigur Bjørt Samuelsen.

### Fríari ræsir

Hon sigur, at ein stórur fyrimunur við at gera Rúsuna til alment partafelag, er at hon fær munandi roknskaparligar og fíggjarligar fyrimunir í sambandi við allar menningartilgongdir og íløguætlanir.

Í dag verður alt virksemi hjá Rúsuni stýrt av roknskaparárinum og ikki langtíðarætlanum og tað gevur henni støðugari karmar at virka undir, sigur Bjørt Samuelsen.

- Sum støðan er nú, hevur Rúsan skyldu til at lata landskassanum eitt ávíst avlop og tað ger, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógv, hon hevur at arbeiða fyri ár um ár, tí avlopið til landskassan kemur í fremstu røð og so má annað virksemi lagast eftir tí.

Men verður hon eitt alment partafelag, verður tað framvegis eitt krav um avlop til landskassan, tí talan er um eina inntøku, sum landskassin ikki vil sleppa.

# Lættari hjá Rúsuni at vera partafelag

RÚSAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Verður Rúsan alment partafelag, fer tað at geva okkum heilt aðrar møguleikar at leggja virksemið til rættis.

Tað sigur Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsuni.

Hon tekur undir við tankanum um, at Rúsan verður alment partafelag.

Sum støðan er nú, má virksemið hjá Rúsuni leggjast frá ári til ár.

- Vit hava krav um, at Rúsan skal geva eitt ávíst avlop í landskassan. Tá ið vit so leggja okkara virksemi til rættis, mugu vit fyrst og fremst hugsa um avlopið til landskassan.

Síðani skal tað burtur av, sum vit keypa vørur fyri og tað, sum handlarnir kosta í lønum og øðrum rakstri.

Tað, sum síðani er eftir er tað, sum Rúsan annars hevur at arbeiða við.

Tað ger, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu nógv vit hava at arbeiða við hvørt ár.

Harafturat er kravið, at frávikið í avlopinum skal ikki vera meiri enn 1%.

- Tað merkir, at vit kunnu ikki hava eitt frávik upp á meiri enn 120.000 krónur um árið av eini sølu upp á 140 milliónir, so tað er ein hárfín javnvág, sum krøvini eru nú.

Ein avleiðing av hesum er, at tað tók okkum trý ár at gera handilin í Saltangará lidnan og tað er ikki vist, at tað er bíligari at gera arbeiðið í bitum.

Hetta er neyvan ein skilagóður máti at umsita landsins ognir upp á.

Verða vit eitt alment partafelag, fer tað at geva okkum fríari ræsir at gera langtíðarætlanir.

Annars verður endamálið við Rúsuni óbroytt, hóast hon verður eitt alment partafelag.

- Endamálið kann framvegis vera at tálma nýtsluna, men tað veldst eisini um, hvat nevndin fyri partafelagnum hevði sett sær fyri tænastuna.

*Hevði úrvalið verið øðrvísi, enn tað er í dag?*

- Tað kundi tað saktans við størri úrvalið, sum vit ikki hava møguleika fyri í dag, tí vit hava ikki hyllapláss og goymslupláss, men verða vit eitt alment partafelag, so at vit kunnu leggja langtíðarætlanir, fáa vit betri møguleika at byggja út.

*Einaferð var alment frammi at politikarar løgdu upp í, tá ið Rúsan fór at selja alko pops, so tað varð tikið av aftur hyllunum. Er tað ynskiligt at sleppa undan slíkum upp íleggingum?*

- Eg haldi ikki, at politikarar skulu leggja seg út í úrvalið. Vilja politikarar at tálma nýtsluni, hava teir møguleika at ávirka prísin og hvussu lætt tað er at fáa fatur á.

*Høvdu tit so kanska fingið alko pops aftur, um so var, at Rúsan verður alment partafelag?*

- Tað dugi eg ikki at siga, men skal alternativið vera at fara frá alko pops, sum er 5%, til sterkt rúsdrekka, er tað ein spurningur um ikki tað veikara alko pops er ein tálming í sær sjálvum, tí tey sterkari sløgini kunnu eisini blandast niður, sigur Elsa Maria Olsen.